*Føroysk oljufólk heimaftur av kunningarferð í útlondum:*

# Royna at læra av royndum hjá oyggjafólkum




*Føroyingar vitjaðu eisini á høvuðsskrivstovuni hjá Western í London*

Nú um dagarnar komu føroyingar heimaftur av eini kunningarferð í New Foundlandi. Talan er um fólk, sum arbeiða í oljufyrisitingini og limir í oljuráðleggingarnevndini. Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini sigur, at ferðin var sera áhugaverd og væleydnað.

Tey sóu, hvussu fólkið í New Foundlandi hevur fyrireikað seg til eina oljuvinnu nú í skjótt 30 ár og hvussu tey nú leggja síðstu hond á verkið. Ætlanin er at byrja framleiðslu í 1997.

Martin Heinesen sigur, at vit hava nógv at læra av royndunum í New Foundlandi, men harfyri er ikki sagt, at vit skulu bera okkum at júst sum teir hava gjørt tað. Her eru umstøðurnar øðrvísi og tí ber ikki til uttan víðari at samanbera okkara støðu við teirra. Eitt nú verður vinnan stýrd sentralt úr Kanada, meðan tann føroyska liggur í Føroyum, nú undirgrundin er yvirtikin. New Foundland er partur av Kanada við avmarkaðum sjálvstýri. Men undirgrundina eigur Kanada.





*Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini og Tina Hansen, skrivari, sum hava verið úti í heimi og kunnað seg við oljuspurningar*

## Stórar oljukeldur

Tað var í 60-unum, at seismiskar kanningar byrjaðu við New Foundland og í 70-unum fóru teir undir veruliga boringar. Hesar hava víst, at tað finnast stórar oljukeldur har, men m.a orsakað av tí nógva ísinum har um leiðir hava newfoundlendarar verið noyddir at finna heilt serliga loysnir fyri hetta økið, og tað hevur eisini eydnast teimum. Í løtuni arbeiða meira enn 3000 fólk við at gera klárt til at fara undir fyrstu framleiðsluna.

Haraftrat finnast nógvir stovnar, sum arbeiða við oljuspurninginum. Samanumtikið hevur New Foundland fyrireikað seg sera væl til eina komandi oljuvinnu. Ansað hevur verið eftir ikki at skunda eina gongd ígjøgnum. Hugsað hevur alla tíðina verið um at fáa sum mest av arbeiði til fólkið í New Foundlandi.

## Falkaland og Føroyar

Á ráðstevnuni í New Foundlandi vóru eisini luttakarar úr Falklandsoyggjunum. Martin Heinesen heldur tað hevur týdning, at vit ikki bara vita, hvussu tey stóru londini bera seg at í eini oljuvinnu. Tað er heilt náttúrligt, at vit sum oyggjaland hyggja eftir, hvussu tey hava borið seg at í New Foundlandi og hvat tey hugsa sær á Falklandsoyggjunum.

Støðan á Falklandsoyggjunum er tann, at teir har júst eru lidnir við tær fyrstu seismisku kanningarnar. Hesar vísa, at umstøður er fyri at finna olju. Tað búgva bert 2000 fólk har og tí er neyðugt at fáa fólk uttanífrá til at gera tað mesta av arbeiðinum. Haraftrat er økið eisini rættiliga óstabilt, tá hugsað verður um, at oyggjarnar liggja nær Argentina, sum ferð eftir ferð hevur roynt at gera krav upp á tær. Tað er annarsLondon, sum avger, hvat skal henda í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu á Falklandsoyggjunum, men allar avgerðir, sum snúgva seg um Falkland skulu góðtakast av lokalfólkinum.

Martin Heinesen heldur, at kunningarferð teirra var sera gevandi og er ætlanin hjá oljuumsitingini at halda fram við at útvega sær allar upplýsingar um oljuvinnu aðrastaðni og ikki minst í smáum oyggjasamfeløgum sum okkara.

## Í London og í Dublin

Føroyska ferðalagið steðgaði eisini á í London og í Dublin á ferðini. Í London varð vitjað inn á gólvið á høvuðskrivstovuni hjá Western Geofysical, felagið, sum hevur fingið litið upp í hendi at gera seismiskar kanningar við Føroyar.

Eisini varð vitjað í írska høvuðsstaðnum Dublin, har skipað var fyri eini jarðfrøðiligari ráðstevnu um frálandavinnu og jarðfrøði. Martin Heinesen vísir á, at írar eru eisini farnir at vísa oljuni ans. Teir hava longu avgjørt at gera kanningar á økjum, sum eisini føroyingar gera krav uppá. Her er talan um Hatton- og Rockalløkið.

## Lopra

Nú eru tey so komin heimaftur og í heldur trongu hølunum í gomlu bátahøllini á Debesartrøð, har Jóannes Rasmussen, sála hevði sína dagligu gongd og halgaði alt lív sítt at kanna føroysku jarðfrøðina, heldur oljuumsitingin til. Tey hava havt úr at gera nú í longri tíð og serliga hesar seinastu mánaðirnar, meðan arbeitt hevur verið við teimum seismisku kanningunum.

Um nakrar fáar vikur koma so fyrstu fólkini frá Western til Føroya at gera fyrireikingar til tær fyrstu kanningarnar. Ætlanin er, at skipið Sea Star skal koma til Føroya um hálvan juni. Skipið er í løtuni í Meðalhavinum. Martin Heinesen sigur, at farið verður fyrst til Suðuroyar at gera seismiskar kanningar í Lopra. Ætlanin er at fara undir hetta arbeiði skjótast til ber. Framkomin mátitól verður lorað niður í boriholið í Lopra og síðani fer Sea Star at skjóta seismik á Lopransfirði og vestan fyri oynna.

jan

SUÐURSTREYMOYAR SJÁLVSTÝRISFELAG
skipar fyri
Politiskum fundi
Á LANDSBÓKASAVNINUM
Í KVØLD, 26. mai, kl. 19.30
Evni: POLITISKA STØÐAN
Helena Dam á Neystabø, formaður Sjálvstýrisfloksins, leggur fyri.
Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag

Vit hava ALT til BAÐIRÚMIÐ
– t.d. stórt úrval av baðirúmsskápum frá HAFA



»Silvia«: B 90 / H 69 / D 15
RØTTU PRÍSIR & BESTA DYGD
Øll við spegilshurðum uttan/innan og í ervaljósinum, sum fæst til øll skápini, 110/220 V við jørð.
Vitjið framsýning okkara á Hálsi ella ringið og fáið tilfar sendandi
SK Svend Krosstein
Falkavegur - Tlf. 14600
VHS
Alt tilfar til VATN HITAVERK SANITET